MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi

**Avloysarastarv**

Eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv sum avloysari fyri fulltrúa er leyst at søkja á Mentanardeildini í tíðarskeiðinum 1. august 2017 til 31. juli 2018. Møguliga verður møguleiki fyri at halda fram í starvinum eftir nevnda tíðarskeið.

**Starvið**

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- At fyrisita, tryggja menning og samstarv og at røkja samskiftið við stovnar og øki undir Mentanardeildini og taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At arbeiða við verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- At umsita virkisøki, sum verða løgd til fulltrúan
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**

Umsøkjari skal:

- hava útbúgving frá lærdum háskúla, t.d. innan løgfrøði, fyrisiting, mentan ella aðra viðkomandi hægri útbúgving
- kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- verða tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Porstrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **16. juni 2017**.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Martin Næs, deildarstjóra, Poul Geert Hansen, aðalstjóra, ella við at vitja heimasíðu ráðsins www.mmr.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, fjølmiðlum og ítrótti. Mentamálaráðið er skipað í Aðalskrivstovu, Undirvísingardeild, Mentanardeild og Stýrisdeild.*

***Á Mentanardeildini** eru 5 størv, og deildin hevur m.a. fyrisitingina av hægri útbúgvingum, mentamálum, upphavsrætti, kirkjuni og trúarmálum, gransking, søvnum, fjølmiðlum og ítrótti.*